## VEÐRIÐ




**Veðrið hóskvøld**
Turt og klárt. 7 m/s av landnyrðingi norðuri. Hitin 2 stig.




**Veðrið fríggjadagin**
Fyrrapartin turt og forststig, men út á dagin hækkar hitin til 4-5 stig og seinnapartin fer at regna. Ættin verður útsynningur, millum 3 og 7 m/s




**Veðrið leygardagin**
Turt allan dagin, men yvirskýggjað. Útsynningur 6 til 8 m/s, og hitin millum 4 og 6 stig.

**Veðrið sunnudagin**
Turt, og út á dagin klárar hann í. Framvegis útsynningur, 4 til 6 m/s. Hitin 5 stig allan dagin.

# Klaksvíkar Bókasavn setur met

Útlánið í 2009 er tað hægsta higartil á Klaksvíkar Bókasavni, sum fegnast um vøksturin. Samstundis staðfesta tey, at Norðoyatunnilin og tað at fleiri miðnámsskúlar eru í økinum eisini hevur gjørt, at nógv fólk úr Eysturoynni og aðrastaðni í landinum koma at lána á bókasavninum.

Útlánið á Klaksvíkar Bókasavni hevur ongantíð verið so høgt sum í 2009, upplýsir bókasavnið frá á heimasíðu sínari, www.kb.fo.

Í farna ári vóru 26936 bøkur lærtar út, og er hetta met hjá bókasavninum.

Samanborið við 2008 eru nærum 2500 bøkur fleiri læntar út í 2009, og svarar hetta til útlánið ein av bestu mánaðunum.

Á bókasavninum hava tey eisini merkt, at tað hevur verið meira at gjørt í fjør í mun til onnur ár. Serliga í samband við uppgávur hjá miðnáms- og fólkaskúlanæmingum, men eisini í heila tikið hava fleiri vitjanir verið í ár, og hetta fegnast tey um á bókasavninum.

Undirsjóvartunnulin og tað at fleiri miðnámsskúlar eru í økinum hevur eisini gjørt, at nógv fólk úr Eysturoynni og aðrastaðni í landinum koma at lána á Klaksvíkar bókasavni.



**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | -4 |
| Nuuk | -2 |
| Qaqortoq | -4 |
| Ammassalik | 1 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | - |
| Reykjavík | 5 |
| Seyðisfjørður | 6 |
| Tórshavn | 5 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | -- |
| London | 0 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 0 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | -2 |
| Keypmannah. | 1 |
| Helsinki | -13 |
| Moskva | -18 |
| Berlin | -1 |
| Warzawa | -5 |
| Kiev | -14 |
| Bukarest | -4 |
| Paris | 1 |
| Madrid | 0 |
| Róm | 8 |
| Malorca | 10 |
| Athen | 15 |
| Malta | 14 |
| Tunis | 13 |
| Beijing | -3 |
| New Dehli | 21 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | -- |
| Sydney | -- |
| New York | 2 |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 18 |
| Meksikobýur | 15 |
| Panama | 32 |
| La Paz | 13 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 22 |

## LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:




Komandi nátt:




**Veðurvánirnar**
Eitt lágtrýst, 1015 hPa í ein landnyrðing úr Skotlandi hvørvur suðureftir. Køld luft við kavaælingi rekur yvir oyggjarnar av landnyrðingi, men eitt hátrýst, 1020 hPa nærkast Føroyum av vesturi.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 03/01 kl. 06⁰⁰ – 04/01 06⁰⁰. Hitin í gjár: -0,0°
Minsti hiti máldur í januar: -10,5° -
Mesti hiti máldur í januar: +13,7°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 03/01 kl. 06⁰⁰ – 04/01 06⁰⁰.
Avfallið higartil í januar: 4 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

1. januar: Mánin næstur jørðini
3. januar: Jørðin næst sólini
7. januar: Seinna kvarter
17. januar: Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 7. jan | - | 12:17 | 11:17 | 23:54 | 11:32 | - | 01:40 | 14:17 | 02:40 | 15:17 | 10:32 | 23:09 | 09:32 | 22:09 | - | 12:32 | 00:55 | 13:32 | - | 12:02 | 00:40 | 13:17 |
| 8. jan | 00:54 | 13:32 | - | 12:32 | 00:09 | 12:47 | 02:54 | 15:32 | 03:54 | 16:32 | 11:47 | - | 10:47 | 23:10 | 01:09 | 13:47 | 02:09 | 14:47 | 00:39 | 13:17 | 01:54 | 14:32 |
| 9. jan | 01:55 | 14:19 | 00:55 | 13:19 | 01:10 | 13:34 | 03:55 | 16:19 | 04:55 | 17:19 | 00:10 | 12:34 | 11:34 | 23:58 | 02:10 | 14:34 | 03:10 | 15:34 | 01:40 | 14:04 | 02:55 | 15:19 |
| 10. jan | 02:43 | 15:07 | 01:43 | 14:07 | 01:58 | 14:22 | 04:43 | 17:07 | 05:43 | 18:07 | 00:58 | 13:22 | - | 12:22 | 02:58 | 15:22 | 03:58 | 16:22 | 02:28 | 14:52 | 03:43 | 16:07 |
| 11. jan | 03:31 | 15:56 | 02:31 | 14:56 | 02:46 | 15:11 | 05:31 | 17:56 | 06:31 | 18:56 | 01:46 | 14:11 | 00:46 | 13:11 | 03:46 | 16:11 | 04:46 | 17:11 | 03:16 | 15:41 | 04:31 | 16:56 |




